# Neistin er nummar eitt...

*...tað er avgjørt og greitt. Mannsliðið hjá Neistanum stóð royndina, tá teir leygardagin vunnu greiðan sigur á VÍF, og tryggjaði sær harvið fyrsta føroyameistaraheitið í 22 ár*



*Frøin var stór, tá tað gjørdist greitt, at Neistin er føroyameistari ár 2000. Her eru tað Páll,Helgi, Heini, Petur og Finnur, sum skrála gleðini úr sær*

ORÐ: JÁKUP MØRK
MYNDIR: JENS KRISTIAN VANG/ÁLVUR HARALDSEN

VÍF-Neistin 22-27 (12-12)

Høllin í Vestmanna var stúgvandi full av fólki, tá avgerandi dysturin um FM-heitið fyri ár 2000 varð leiktur.

Treytirnar hjá báðum liðunum undan dystinum vóru á leið tær somu, tí tað var púra greitt, at vinnarin av dystinum gjørdist føroyameistari. Neistin hevði tó tann fyrimun, at teir eisini kundu standa seg við einum javnleiki, men hóast flestu áskoðararnir roknaðu við einum javnum dysti, so mundi tað ikki vera við javnleiki fyri eygað, at neistaleikararnir fóru á vøllin.

### Ingi mansvardur

Teir fyrstu 30 minuttirnar leikaði ógvuliga javnt á millum liðini bæði. munurin kom ongantíð upp um tvey mál, og liðini bæði skiftust um at hava leiðsluna.

Fyri at byrgja upp fyri álopsspælinum hjá VÍF hevði neistavenjarin gjørt av, at Ingi Olsen skuldi mansverjast frá fyrsta bríksli, og hetta darvaði eisini vestmenningunum almikið.

Ikki tí, so at siga allan hálvleikin vóru tað vestmenningar, sum vóru vandamiklari, og teir megnaðu eisini betri at kom fram at skotroyndunum, men Petur Magnusson í neistamálinum stóð ein sannan branddyst, og millum annað tók hann fullkomuliga pippið frá Sámli Joensen.

Í hinum endanum var so at siga alt álopsspælið bygt á avrikini frá kanónunum hjá Neistanum, Heina og Áka, og tað var einamest teimum báðum at takka, at Neistin megnaði at fylgja við málskjótingini hjá heimaliðnum. Av teimum tólv málunum, sum Neistin fekk í fyrra hálvleiki, skeyt Kári Mortensen eitt, meðan Heini og Áki tóku sær av restini.

Merkisvert var annars, at hvørki av liðunum megnaðu at gera sær dælt av yvirtalsstøðum, tá hesar íkomu. Miðskeiðis í hálvleikinum vóru vestmenningarnir fimm mans á vøllinum, uttan at Neistin megnaði at skræða seg leysan frá teimum. Løtu seinni vóru Neistamenninir bert fýra mans á vøllinum, men heldur ikki tá megnaðu Vestmenningarnir at leggja sjógv ímillum liðini bæði.

### Neistin leyp avstað

Beinan vegin sum seinni hálvleikur byrjaði, fekk Neistin tað, sum seinni skuldi vísa seg at gerast ein avgerandi leiðsla.

Eftir at vestmenningar høvdu lagt fyri við málskjótingini, fekk Neistin nú fimm mál á rað, áðrenn vestmenningarnir megnaðu at svara aftur. Vestmannaverjan fekk síðani nógv betri tak á neistamonnunum, men tá teir ikki megnaðu at skora sjálvir, minkaði munurin ikki.

Eisini VÍF royndi seg nú við mansverju, men hetta gav betri pláss til hinar leikararnar, og serliga dugdi Áki Mørk at gera sær dælt av hesum, men eisini aðrir leikarar gjørdust nú alt meira sjónligir.

Miðskeiðis í hálvleikinum var tað brádliga sum um neistaliðið eksploderaði. Enn einaferð skutu teir nú fimma mál á rað, soleiðis at leiðslan øktist upp í átta mál. Bláa áskoðarafjøldin, sum mest sum hevði hersett á leið ein fjórðing av høllini, leikaði nú í, púra vís í at tey skuldu verða vitni til leingi saknaða FM-sigurin.

Vestmenningar royndu at enda at mansverja bæði Heina og Áka, men ov seint var, og hetta mundu leikararnir eisini merkja sjálvir. Seinastu løtuna av dystinum, skuldu neistaleikararnir bert dríggja sær tíðina, og hóast VÍF móti endanum fekk trý mál á rað, so kom sigurin ongantíð í vanda.

### Spenningur

Tikið samanum, so mundi dysturin leygardagin ikki vera av teimum best leiktu hetta kappingarárið. Mansverjur og nervar mundu eisini gera sítt til, at tað ongantíð kom veruligt glið á spælið, men undirhaldið var tó á eini leið alla tíðina.

Fram til tað vóru einir tíggju minuttir eftir at leika, var nervin í dystinum alla tíðina til staðar, og tá spenningurin at enda var fokin, gjørdu bláklæddu neistaáskoðarnir sítt til, at veruligur veitslurómur var í høllini.

Eftir dystin tustu áskoðararnir inn á vøllin, har hálsfevningar, mussar og sigurssangir vóru á skránni. Gleðin á bláu andlitunum var sjónlig, og hví skuldi hon ikki verið tað. Lið teirra hevði júst tryggjað sær gullmerkini í einum altavgerandi dysti, sum samstundis setti punktum fyri einum kappingárið, sum helst man teljast millum tey mest spennandi í langa tíð.

Samanumtikið mundi tað vera á eini leið, at tað varð Neistin, sum fekk FM-heitið, tá avtornaði. Eftir eina heldur laka byrjan, endaðu teir grundspælið á einum triðja plássi, men eftir jólasteðgin hevur eingin staðið teimum kurl. Í øllum førum ikki í landskappingini.

Eitt flott avrik, sum í seinasta enda var nóg mikið til at tryggja felagnum fyrsta meistaraheitið í 22 ár, í øllum førum á manssíðuni.

Tískil gjørdist talan um ein bláan leygardag í Ítróttarhøllini í Vestmanna, og allarhelst mundi talan í gjár eisini verða um ein bláan mánadag fyri fleiri av teimum, sum vara at liðnum.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VÍF: Ingi Olsen 6 (3), Agnar Joensen 4 (2), Johnny Joensen 4, Martin Hummeland 4, Sámal Joensen 2, Rógvi Nielsen 1, John Zachariasen 1
Neistin: Heini Joensen 11 (1), Áki Olsen 7, Áki Mørk 3, Elmar Ósá 2, Finnur Hansson 2, Kári Mortensen 1, Jákup Sverri 1
**Brotskøst:**
VÍF 5, Neistin 2
**Útvísingar:**
VÍF 2, Neistin 6
**Dómarar úr Kyndli:**
Hanus Kúrberg og Hans Thomassen



*Føroyameistarar 2000, Neistin: Standandi frá vinstru Ræni Slættanes, Áki Mørk, Jákup Sverri Kass, Heini Joensen, Finnur Hansson, Kári Mortensen, Karl Oddmar Rasmussen og Áki Olsen*
*Húkandi frá vinstru: Bjartur Brekkstein, Petur Magnusson, Bogi Henriksen, Páll Poulsen, Elmar Ósá og Helgi Justinussen*



# Beinini vóru sum blýggj

*Áki Olsen mundi vera stóri sigursharrin leygardagin, tá hann framman fyri áskoðarafjøldini í Vestmanna, megnaði at taka gullmerkini frá VÍF*



JÁKUP MØRK

Tá vit spurdu hann, um tað hevði verið stuttligt at itið Áki Olsen undan dystinum í dag, greiddi Áki Olsen soleiðis frá.

- Eg má siga akkurát sum er, at havi verið á WC nakrar ferðir í morgun, og tá dysturin byrjaði kendist tað um beinini vóru úr blýggi. Eg fekk tó skorað okkurt mál beinanvegin, so nervarnir hvurvu meira ella minni, sum dysturin leið.

Móti endanum av dystinum sást eisini, at Áki hevði somikið stórt yvirskot, at hann eftir enn eitt mál, kundi gera eitt V-tekin móti áskoðarunum. Um hetta segði hann, at freistingin var somikið stór, at hann mátti gera tað.

- Eg hevði fingið onkrar viðmerkingar frá nøkrum teirra, sum vanliga standa á sínum plássi, sigur Áki, sum tó leggur dent á, at hann ikki metir nakað ilt liggja í hesum.

- Eingin ivi skal vera um, at áskoðararnir í Vestmanna eru ótrúliga góðir, og stuðla liði sínum ótrúliga væl, segði ein fegin Áki Olsen at enda.

# Eg skuldi vinna

*Einki er at taka seg aftur í, at avrikið hjá Peturi Magnussyni var ein hin mest týðandi orsøkin til, at tað eydnaðist Neistanum at vinna dystin*



JÁKUP MØRK

Spurdur um hann helt hetta vera besta dystin, sum hann hevði leikt hetta kappingarárið, svaraði Petur, at tað visti hann nú ikki. - Tað hava verið nakrir góðir dystir. Í dag havi eg nakrar bjargingar beinanvegin, og so koyrir tað bara, greiðir málverjin frá, sum eisini leggur dent á, at verjan stóð seg sera væl í dystinum.

Seinasta ár var hann ein av kyndilsleikarunum, sum í seinastu løtu mistu gullið á gólvið, og spurdur um hetta eisini hevði sítt at siga, var íslendingurin sera avgjørdur.

- Í fjør kláraðu vit tað akkurát ikki, og í steypafinaluni í ár vunnu vit heldur ikki, hóast vit høvdu allar møguleikar. Tað skuldi ikki gleppa tríggjar ferðir á rað, og tað gjørdi tað tíbetur heldur ikki, segði ein fegin málverji eftir dystin.



# Tað gekk bara ikki

*Hjalmar Klein Olsen, sum í vetur hevur vant besta mansliðið hjá vestmenningum, helt, at fleiri orsøkir vóru til tapið móti Neistanum*

JÁKUP MØRK

- Tað var so nógv, sum kiksaði, segði Hjalmar Klein Olsen, tá vit eftir dystin spurdu, hvør orsøkin var til, at tað ikki eydnaðist VÍF at vinna FM-heitið leygardagin.

- Sum so var Bárður einasti leikarin, sum veruliga spældi ein góðan dyst, helt venjarin, sum annars vísti á, at bakspælararnir hjá teimum ongantíð sluppu rættuliga fram at.

- Ingi verður beinanvegin tikin úr dystinum, og tá so Sámal heldur ikki sleppur framat, so fáa vit ikki gogd á okkara spæl, greiddi Hjalmar frá, sum kortini legði dent á, at tað gekk so nøkunlunda í fyrra hálvleiki.

Í seinna hálvleiki koma vit ongantíð í gongd. Teir fáa nøkur mál beinanvegin, og hetta noyðir okkum at royna við mansverju, men samstundis skapar hetta betri pláss til hinar leikararnar, og m.a. Áki Mørk gjørdi sær rættuliga dælt av hesum, helt Hjalmar.

Eina løtu í seinna høvdu vestmenningar tó fatur á Neistanum, og Hjalmar helt eftir dystin, at um VÍF tá hevði fingið nøkur mál, so høvdu teir komið rættuliga innaftur í dystin. Hetta hendi tó ikki, og móti endanum mugu vit bara satsa alt, og so gekk tað bara sum tað gekk, var niðurstøðan hjá Hjalmari.

Annars heldur Hjalmar eisini, at vestmenningarnir hava verið nakað tunnir við bakspælaranum í vetur. Áki Olsen hevur ikki verið við í ár, og harumframt hevur Daniel Rápa verið skaddur meginpartin av tíðini, og Hjalmar er sannførdur um, at nógv hevði verið øðrvísi, um rumenin hevði verið tøkur alt árið.

Sostatt kundi tað ljóðað sum um, at ein loysn kundi verið at fingið Áka Olsen aftur til barndómsfelagið, og í øllum førum segði Hjalmar, at teir vóna at hava hann aftur í hópinum komandi kappingarár.

# Brendu ov nógv

*Liðskapirin hjá vestmenningum, Ingi Olsen, helt eftir dystin, at VÍF átti at fingið meira burturúr møguleikunum í fyrra hálvleiki*

JÁKUP MØRK

- Vit brenna alt ov nógvar møguleikar í fyrra hálvleiki, tí í veruleikanum høvdu vit nógv fleiri møguleikar enn Neistin fyrsta hálva tíman, helt Ingi Olsen fyri, tá vit eftir dystin hittu hann á orði.

Hetta helt hann í øllum førum vera størsta orsøkin til, at tað ikki eydnaðist VÍF at basa Neistanum leygardagin, og harumframt helt hann eisini, at við eitt sindur av hepni, kundu teir eisini koma aftur í aftur í seinna hálvleiki, men soleiðis skuldi tað bara ikki verða.

### Tosað saman

Ein av týdningarmestu leikarunum á neistaliðnum er uttan iva Áki Olsen, og eftir dystin spurdu vit eisini Inga, hvussu sambandi teirra millum var, nú hann í vetur hevur kappast móti vestmenningum.

- Vit tosa sjálvandi saman framvegis. At hann hevur skift felag er ein avgerð, sum hann hevur tikið, men vit hava verið væl alla tíðina, sigur eldri Olsen beiggin.

- Tað nyttar jú einki at illneitast inn á hvønn annan av hesi orsøk, og hvør veit. Kanska fáa vit brúk fyri honum aftur seinni, vóru seinastu orðini frá Inga, áðrenn vit sløktu fyri bandupptakaranum.

